


*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, handaði HB steypið, sum teir vunnu fyri fyrstu ferð síðani 1998. Framman undan eiga B36 (2), NSÍ, KÍ og GÍ lutabrøv í steypinum*

# Løgmanssteypið á somu hill sum bikar og súlur

**At Jens Martin sá reytt beinanvegin hevði við sær, at talan bara í lítla løtu í 2. hálvleiki var um spenning og drama, áðrenn HB staðfesti sína støðu sum teir bestu av øllum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Støðutalvan eftir fyrru helvt av landskappingini boðaði frá tí. HB var favorittur at vinna steypafinaluna, og HB vann steypafinaluna. Men áskoðararnir vórðu snýttir fyri tað dramaið og tann intensitetin, sum finalan fyri tveimum árum síðani millum somu feløgini hevði lagt upp til.

Tíggju minuttir vóru farnir, tá ið málverjin, liðformaðurin og akkersmaðurin hjá NSÍ, Jens Martin Knudsen, varð rikin av vøllinum. NSÍ hevði stórar trupulleikar í uppspælinum. Eftir langa og adressuleysa sending úr vinstru og fram ímóti miðjuni, steðgaði HB royndini hjá mótstøðumonnunum. Bólturin varð stungin fram ímillum til Heine Fernandez. Jens Martin var sum ein køttur á brotsteigarmarkinum, tveitti seg og í samanbresti við danska álopsspælaran spældi hann bóltin við arminum.

So var reyða kortið á lofti, og fyri NSÍ og málverjan fóru fyrireikingarnar, sum teir seinasta mánaðin høvdu gjørt í Runavík og um vikuskiftið í Hvalba, í smildur.

Tað kundu teir í HB sjálvandi einki gera við. Teir arbeiddu út frá galdandi fyritreytunum, og tá ið stríðið var lokið, og Suni Johansen hevði bríkslað fyri síðstu ferð, var eingin ivi. HB hevði vunnið, og harvið hava teir fingið sítt navn fyri fyrstu ferð í Løgmanssteypið, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999.

Frammanundan hevur HB vunnið eitt Løgmanssteyp, tríggjar Ísafjarðarsúlur og eitt Ísafjarðarbikar til ognar. Stutt undan hundrað ára føðingardegnum góvu teir sjálvir sær hetta steypið í gávu, so tað á stóru føðingardagsveitsluni seinni í heyst kann standa undir liðini á øllum hinum. Um HB fer at vinna nýggja Løgmanssteypið til ognar, fer eingin at vita nakað um fyrrenn í 2008. Men teir hava møguleikan, og finalan vísti, at HB hevur stóra breidd og nógvar ungar spælarar, sum teir kunnu byggja á.

## Spenningurin

Útvísingin hevði sjálvandi við sær, at NSÍ uppleggið fór fullkomuliga í fisk. Gert Langgaard noyddist av vøllinum fyri at geva rúm fyri nýggja málverjanum, Jákupi Emil Hansen, sum stóð seg manniliga.

Andy Olsen varð settur heilt fram í spíssin, Helgi L. Petersen varð fluttur úr høgru og sentralt fyri at útinna arbeiðið hjá tveimum.

Dygst eftir steðgin snittaði Helgi (hann gav mótstøðumanningum eitt lítið puff) við høvdinum bóltin inn við handara stólpanum, eftir at Brynjolvur Nielsen hevði lagt fríspark úr høgru. So var støðan 2-1 til HB, og í NSÍ og millum óføru viðhaldsfólkini hjá teimum tóktist ein vón at kveikjast um, at tað kanska skuldi bera til at gera tað, sum fornuftin og skilið søgdu, ikki átti at bera til.

Vónin livdi í eitt korter. So punkteraði Páll Mohr Joensen, sum beinanvegin eftir steðgin var komin á vøllin fyri Fernandez, NSÍ. Eftir uppspæl í høgru og innlegg tvørturum og eina ferð aftur og fram, skumpaði ungi maðurin bóltin síðsta lítla teinin um strikuna. Dánial Hansen og Óli Hansen høvdu kempað í NSÍ miðverjuni, men hesa ferð vóru teir ov stuttir.

Harvið var 3-1, og so var spurningurin, hvussu stórur sigurin skuldi gerast. Megin fór úr teimum gulu og svørtu, sum høvdu roynt at stríða sítt stríð, og endiliga fingu HB spælararnir spælið at glíða. Teir høvdu tíð og pláss, og teir spældu seg til fleiri upplagdar møguleikar. Hallur Danielsen, sum eftir triðja málið legði vertin í verjuskyldurnar, fintaði fýra mótstøðumenn um koll, men skotið fór dygst skeivu megin handara stólpan, og Rógvi Jacobsen drønaði úr tólv metrum bóltin í tvørtræið, sum livdi tað, ið var eftir av tíðini.

## Avgerandi løtan

Dramatikkurin hevði ikki við úrslitið at gera, men heldur reyða kortið, sum kom so tíðliga. Dygdin í spælinum var, sum hon hevur verið seinastu árini í steypafinalunum. Undirlagið er ikki tað, sum spælararnir eru vanir við, og hesa tíðina eru spælararnir og liðini ikki í toppvenjing. Soleiðis er tað bara, og tað gongur sjálvandi út yvir avrikini.

HB vildi vinna, og teir fingu undan steðginum tey bæði týdningarmiklu málini. Hesa løtuna hevði tað serligan týdning, at Rúni Nolsøe, sum nógv av uppspælinum hjá HB snarar kring, hevði nógv pláss, og at tað var heilt galið í vinstra borði hjá NSÍ, sum saknaði leikbannaða Sjúrð Jacobsen meiri, enn tað frammanundan kundi roknast við. Bæði í verju og álopi. Tá ið sentrali miðvøllurin heldur ikki hevði neyðugu tyngdina og styrkina at steðga mótstøðumonnunum og at varðveita og spæla, so var eingin vón.

Uppleggið hjá HB var í 4-4-2 útgangsstøðu at bróta ígjøgnum í borðunum og at leggja innfyri í høvdini á sera sterka Rógva Jacobsen og eisini Heine Fernandez. Fleiri ferðir var um reppið, at teir fingu mál, og Rógvi hevði tveir ella tríggjar møguleikar, sum áttu at havt borið mál við sær.

Fyrra málið kom eftir gjøgnumbrot í høgru. Rúni var púra einsamallur. Málverjin hálvbjargaði tveimum skotroyndum frá honum, men seinnu ferðina rullaði bólturin fyri føturnar á leysa Heine Fernandez, sum sendi í tóma málið.

Rókur Jespersen, sum saman við Kára Nielsen og Heðini á Lakjuni mannaði miðvøllin saman við Rúna Nolsøe, átti annað málið. Talan var um frágera gott mál eftir uppspæl í høgru. Eitt sindur kroystur og langt úti á vøllinum í høgru var ungi maðurin púra kaldur, tá ið hann eina ferð mól um seg sjávan og so sera hegnisliga lyfti upp í handara krókin. Flott, flott.

## Bíðitíðin

Eftir 3-1 málið hjá Pálli M. Joensen bíðaði HB eftir steypinum. NSÍ flutti Helga L. Petersen fram undir liðina á Andy Olsen í vónum, at okkurt hissini sprellið skuldi bera mál og harvið nýggja vón við sær.

HB setti veteranin Jan C. Dam í miðverjuna. Bárður Johannesen, sum ikki hevur verið at sæð í HB málinum í nógvar mánaðir, helt skil á, og Símun Eliasen, Vagnur Mohr Mortensen og Janus M. Joensen vóru tryggir og skilagóðir.

At HB hevur breitt úrval sást aftur, tá ið Rasmus Nolsøe varð settur á vøllin og í, at so skilagóðir ungir spælarar lupu av sum Eli Thorsteinsson, Hendrik Rubeksen og Emil N. Leifsson.

Í fimm ár hevur HB bíðað eftir nýggja Løgmanssteypinum. Tvær ferðir hevur tað kiksað í finalum. Hesa ferð bíðaðu teir síðsta lítla hálva tíman. So fekk Rúni Nolsøe klørnar í steypið, sum teimum verður ynskt hjartaliga tillukku við. Nú hava HB sett kós eftir FM heitinum, og júst í løtuni er ilt at síggja, hvør skal megna at leggja sovornar fótonglar fyri teir, at tað skal kiksað.

Tað treingist á steypahilluni í Gundadali.








## LØGMANSSTEYPIÐ

**NSÍ-HB 1-3 (0-2)**

Finala á Tórsvølli ólavsøkudag 2004, kl. 16.00
0-1: Heine Fernandez 12.
0-2: Rókur Jespersen 38.
1-2: Helgi L. Petersen 49.
1-3: Páll M. Joensen 64.
4.300 áskoðarar
Dómarakvartett: Suni Johansen, Jens Albert Simonsen, Hans Falkvard Hansen og Eiler Rasmussen
NSÍ: 1. Jens Martin Knudsen, liðformaður - 15. Brynjolvur Nielsen (20. Johan Davidsen, 68.), 3. Óli Hansen, 4. Dánjal Hansen, 8. Jónstein Petersen - 11. Alexandar Jovevic, 6. Ian Højgaard, 10. Justines R. Hansen (5. Kári Hansen, 46.) - 9. Helgi L. Petersen, 7. Gert Langgaard (12. Jákup Emil Hansen, 13.), 13. Andy Olsen
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 2. Áki L. Hansen, 14. Eddie Mikkelsen, 16. Tórður Thomsen, 19. Einar Hansen
Gult kort: eingin
Reytt kort: Jens Martin Knudsen 11.
Venjari: Jógvan Martin Olsen
Hjálparvenjari: Arnfinn Langgaard
Fysioterapeutur: Marjun Thomasen
Liðleiðarar: Bjarni Kjeld og Rósing Johannesen
HB: 1. Bárður Johannesen - 18. Hallur Danielsen, 19. Vagnur Mohr Mortensen, 15. Símun Eliasen, 4. Janus M. Joensen - 10. Rókur Jespersen (6. Jan C. Dam, 65.), 7. Rúni Nolsøe, liðformaður, 14. Kári Nielsen, 20. Heðin á Lakjuni (17. Rasmus Nolsøe, 77.) - 8. Rógvi Jacobsen, 11. Heine Fernandez (24. Páll M. Joensen, 46.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 3. Eli Thorsteinsson, 12. Emil N. Leifsson, 21. Pól Næs Joensen, 22. Hendrik Rubeksen
Gult kort: Símun Eliasen 55., Kári Nielsen 76., Rasmus Nolsøe 90.
Reytt kort: eingin
Venjari: Heine Fernandez
Hjálparvenjari: Oddbjørn Joensen
Fysioterapeutur: Klæmint Isaksen
Liðleiðarar: Sigurð Hansen og Sámal Hansen

# Skelkurin gjørdist dýrur

**Málskjúttin hjá runavíkingum, Helgi L. Petersen, helt eftir dystin, at skelkurin, ið NSÍ fekk av útvísingini hjá Jens Martin, gjørdist teimum dýrur**

STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Tá ið vit hittu ein vónbrotnan Helga L. Petersen stutt eftir dystin, segði hann, at útvísingin hjá málverja teirra tíðliga í dystinum oyðilegði dystin fyri teir. Reyða kortið hjá Jens Martin vendi øllum tí taktiska upplegginum hjá NSÍ á høvdið, tí neyðugt var at umskipa liðið.

- Tað var ein øgiliga stórur skelkur hjá okkum, tá ið Jens Martin, ið er royndasti spælarin á liðnum, fekk reyða kortið. Tað tók eisini drúgva tíð hjá okkum at fóta okkum eftir útvísingina, og tað kostaði dýrt, sigur Helgi L. Petersen. - Beint eftir útvísingina vóru vit rættuliga skelkaðir í eina góða løtu, og hesa løtuna gagnnýttu HBarnir til at gera tvey mál, sigur hann.

Helgi L. Petersen minkaði sjálvur um munin fyri runavíkingar, tá ið seinni hálvleikur var fáar minuttir gamal, og rituvíkingurin heldur, at NSÍ var rættuliga væl við eina góða løtu eftir steðgin. - Eg haldi, at seinni hálvleikur var væl javnari enn tann fyrri, og vóru vit neyvari, og serliga eg sjálvur, so høvdu vit kanska fingið javnað, sigur Helgi L. Petersen.

# Gott at verða aftur

**Fyri fyrstu ferð í ár var veteranurin Jan Dam aftur at síggja á HB-liðnum**

STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Um miðjan seinna hálvleik í steypafinaluni Ólavsøkudag var ein gamal kenningur sendur á vøllin fyri HB. Talan var um 35 ára gamla Jan Dam, sum avloysti 19 ára gamla Rók Jespersen. Jan hevur verið búsitandi í Danmark síðani undanfarna kappingarár, men nú er hann komin aftur á klettarnar, og samstundis er hann komin aftur til barndómsfelagið HB.

## Okkara upplegg helt

Tá ið vit hittu Jan Dam, eftir at hann enn einaferð hevði tikið ímóti einum gullheiðursmerki í sambandi við steypasigur, var hann ógvuliga fegin um at verða aftur á HB-liðnum. - Tað er ógvuliga hugaligt at verða aftur, og serliga stuttligt er tað at spæla eina steypafinalu, sigur fyrrverandi landsliðskempan, sum seinasta lítla árið hevur hildið fótbóltin viðlíka í útisetafelagnum ÍF Føroyar.

Eisini helt Jan Dam, at útvísingin av Jens Martini hevði nógv at siga fyri dystin. - Tað broytti dystin fullkomiliga, og tað vil altíð verða tungt at spæla 10 móti11 í næstan ein heilan dyst, segði Jan Dam. Hóast HB bráddliga hevði ein mann fleiri á vøllinum, so broyttu teir ikki taktiska uppleggið, segði Jan Dam og legði afturat, at uppleggið hjá havnarliðnum helt allan dystin.

Jan Dam segði eftir dystin, at hann dugdi ikki at taka dagar ímillum, um ársins HB-lið er betri enn liðið í fjør, sum við millum annað Jan Dam á liðnum vann meistaraheitið. - Eg haldi, at tað eru tvey ógvuliga jøvn lið. Í mun til í fjør eru profilar sum Tór-Ingar og Andrew burtur, men hinvegin eru nakrir aðrir profilar komnir til felagið, segði veteranurin.